# Jólakvøld í Oyndar



HUGLEIÐINGAR

*Frits Johannesen*

Tær gomlu føroysku kirkjurnar hava eitt kirkjurúm, sum fólk flest kenna seg væl í. Viðurin ber natúrligan anga við sær. Er kirkjan nývaskað, er hesin angi næstan gudiligur. Sum siður var jólakvøld fyri góðum fimmti árum síðani, bleiktraðu kertur inn eftir gólvinum, og ljós varð kveikt í ljósakrúnum og á altarinum í Oyndarfjarðar kirkju. Andlitsbrøgdini á bygdarfólkunum vóru merkt av dagligum strevi og mangan trongum lívskorum, sum dansaðu undir hesum leiftrandi ljósi. Soleiðis var hetta jólakvøld 1950 í Oyndarfjarðar kirkju.

Altartalvan í Oyndarfjarðar kirkju er málað av C. W. Eckersberg. Hetta er av Jesusi í Getsemane. Hvussu nógv henda mynd er listaliga virðisett, verður ikki farið í holt við, men Ekersberg er høgt í metum sum listamálari. Hann er føddur í 1783 og doyr 1853. Hann kemur undir málararnar frá gulltíðini í Danmark. Eckersberg hevur í dagbók síni skrivað: 18. august. 1838 Besøg af Soeliuti Heidemann og prof Friedenreich angående et billede til en kirke på Færøe., og 12. febr. 1840: har rørt farver på altertavlen til Færøe. Fleiri slík notat eru í dagbók hansara líka til 27. mars 1840, tá ið hann skrivar: Arbejdet på og blevet færdig med alterbilledet til Færøe, som forestiller Kristus i Getsemane. 14. august 1840 Besøg af prof. Friedenreich, som bragte betaling: 100 Rhd. For altertavlen Kristus i Getsemane ( til Østerø kirke på Færøe). Hetta, sum her er nevnt um dagbók hansara, hevur Petur Andrew Petersen, prestur, hugt eftir og latið mær upp í hendi. Takk fái hann fyri tað.

Lítið vitstu fólk í Oyndarfirði, at altartalvan var málað av einum málara, sum nam sær læru í list í Frankaríki (1810) og í Italiu (1815),. Samstundis sum Eckersberg var í Rom, var eisini myndahøggarin Berthel Thorvaldsen har. Thorvaldsen gjørdi í 1816 eina høggmynd av Eckersberg, beint áðrenn hann fór heimaftur til Danmarkar. Hetta var ein tøkk fyri ta frálíku myndina, ið Eckersberg málaði av honum í Rom 1814. Eckersberg var næm-ingur hjá Jacques- Louis David, sum málaði myndina Tann deyði, Marat. Hetta er eitt meistaraverk. Marat var skrivandi kollveltingar maður undir tí fronsku byltingini, og var myrdur í baðikari sínum í 1893 av eini aðalskvinnu, sum æt Charlotte Corday, ið sjálv misti høvdið í Guillotinuni

Eckersberg var ein meistari at fáa dýbdina í málningum sínum so livandi og reina sum gjørligt og ikki bert tað, men hann kendi møguleikarnar við tí kubiska í tí tóma rúminum í hugtøkum. ( t.d. Korvet på stabelen) Hetta var, áðrenn sálarfrøðingarnir fóru at umrøða hesi eyðkenni metafysiskt. Eisini skal nevnast, at langt áðrenn Newton vísti á ta vanligu atdráttarmegina, so høvdu listafólk sett út í kortið, hvussu likam í málningum ávirkaðu hvørt annað (Michelangelo: Tá ið Adam varð skaptur) Hetta er kanska ikki serliga jólaligt at skriva um, men eyguni hava altíð flogið frá Jesusi í Getsemane, upp í tróðrið í tí spælandi ljósinum, sum er í hesum fagra kirkjurúmi í Oyndarfjarðar kirkju. Soleiðis var eisini jólakvøld 1950.

Jólakvøld hoyrdust fótafet oman eftir Túni. Fólk vóru í jólahýri og altarsskrýdd.og vóru á veg í kirkju. Ansastova, sum nú man vera uml. 100 ár, liggur við henda "alfara" veg. Úr hesum húsi koma ættarfólk míni frá í móðirættina. Hon er áføst Heiriksstovu. Hjá Peri liggur skamt ífrá, somuleiðis Móritsarstova og hjá Dunga Oluffu. Við Lið er eisini í hesum hópibeint omanvert durin í Ansastovu, men her var øskukalt 1950. Her búðu Elspa og Petur við Lið. Tey vóru systkin og ógift.

Tær gomlu genturnar komu sinniligar inn eftir kirkjugólvinum og settu seg í heimastólin, har familjan hevði sitið í fleiri mansaldrar. Jólaandlitið setti seg fast í bitar, kvistar og fjalirnar undir loftinum. Mentanarliga jørðildi hjá teimum var umhvørvið Niðri í Túni. Verðin var ikki tann víði heimur, sum fólk í dag nálgast at, men eg ivist onga løtu í, at teirra kosmiski hugaverð var eins væl røkt, sum hjá fólki, ið nú eru uppi á døgum. Tær bóru miðøldina á baki. Hugaheimurin var sprottin úr Brockmann, kingoløgum, sagnum, fyrndarsiðum, huldufólkum, gævudøgum og tungum løtum bæði á sjógvi og landi. Mundi Jesuspápi ikki vera góður við hesar einsligu kvinnur, ið dusaðust millum prest, dekn, organist, klokkara og bygdafólk í síni heild? Jesus í Getsemane, sum Eckesberg hjá teimum gomlu gentunum, ið hugdu upp á myndina og upp á Jesus og tað fáliga ljósið í myndini. Ljós skýggj í bláari skygging í mánalýsi lógu yvir hesa stund í tí døkku, dimmu viðarlundini, Getsemane.

Vit vóru ikki í Getsemane, men vit vóru í í kirkju jólakvøld í Oyndarfjarðar kirkju og sótu